

# Fær friðskjól í Peru

Andstøðuleiðarin í Venesuela, Manuel Rosales, hevur fingið politiskt friðskjól í Peru. Rosales flýddi úr Venesuela til Peru fyri nøkrum vikum síðani, og hann legði venesuelska forsetan, Hugo Chavez, undir politiska forfylging ímóti sær. Við teirri grundgeving hevur stjórnin í Peru nú givið honum politiskt friðskjól har. Tann 56 ára gamli Rosales var guvernørur í einum oljuøki í Venesuela frá 2002 til 2004, og myndugleikarnir vilja vera við, at hann misbrúkti sítt vald, og teir hava eisini lagt hann undir svik. Í 2006 stillaði Rosales upp ímóti Hugo Chavez, forseta, men tapti.

# eim úr Chili

iskum fiskasløgum – ikki minst úr sild, leggur hann aftrat.

## Helst sild

Tá nýggja Norðborg verður klár at loysa, fer skipið væntandi ein royndartúr á svartkjaft, har útbúnaðurin og flakamaskinurnar verða royndar.

- Hin møguleikin er, at royndartúrurin verður eftir sild. Vanliga byrjar sildatíðin millum 20. og 25. mai, men nú veldst eisini um, hvat frættist um sild, tá tann tíðin kemur.

Við nýggju Norðborg verða einir 30 mans, og tað eru einir 4-5 fleiri enn við gamla skipinum.

- Nú vit bara koma at fiska við einum skipi fyribils, hava vit nóg mikið av fólki at taka av, leggur hann aftrat.

## Nógv fyri pengarnar

Sjálvur byggikostnaðurin av Norðborg, sum er 83,5 metrar long og 18,4 metrar breið, er 240 miljónir krónur, og aftrat hesum kemur byggirenta, eftirlit, útgerð og heimsigling.

- Soleiðis verður samlaði kostnaðurin nakrar miljónir aftrat.

Jón Rasmussen sigur, at teir eru nøgdir við prísin og halda seg hava fingið nógv fyri pengarnar.

- Høvdu vit smíðað eitt slíkt skip í Noregi í dag, hevði kostnaðurin verið í minsta lagi 100 miljónir krónur meiri. Vit hava eisini skilt, at eitt slíkt skip smíðað í Chili í dag hevði kostað einar 100-120 miljónir meiri, enn hetta skipið kostar.

Hann heldur tí ikki, at teir kunnu vera annað enn nøgdir við byggikostnaðin.

- Vit eru sera spentir eftir at koma í gongd, og vit halda ikki, at útlitini eru so galin, eitt nú tí, at sildastovnurin tykist vera væl fyri, sigur Jón Rasmussen.

*Norðborg á heimferð – og gongst sum ætlað, verður skipið á Klaksvík dýra biðidag*





# Ganga nýggjar leiðir

**- Vit eru í holt við eitt spennandi samstarv um svartkjaftaflak, sigur Jón Rasmussen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú føroyska svartkjaftakvotan er vorðin so lítil og tað, sum eftir er at býta millum pelagisku skipini í Føroyum, er uppaftur minni, kundi mangt bent á, at útlitini hjá hesum flota ikki eru nakað serlig.

Men teir, sum nú fáa ein nýbygning úr Chili fyri meiri enn 240 miljónir krónur, lata ikki so illa at.

- Nei, vit hava rímiliga góðar vónir um, at hetta fer at bera til.

Tað sigur Jón Rasmussen, sum verður annar av føstu skiparunum við nýggju Norðborg.

- Sildastovnurin er væl fyri, men tað er svartkjaftastovnurin ikki. Hinvegin royna vit at fáa meira burtur úr teimum tonsum av svartkjafti, sum fella í okkara lut at fiska.

Jón sigur, at Norðborg er farin í eitt áhugavert samstarv við Høvdavirkið í Leirvík um svartkjaft.

- Vit hava gjørt royndir við at skráskera svartkjaft, sum síðan verður turkaður í Leirvík og seldur til Nigeriu.

Hann sigur, at Høvdavirkið kann bjóða Norðborg 5 krónur fyri kilo av flaki, og tað heldur Jón ljóðar áhugavert.

- Ein slík verkætlan er spennandi í sjálvum sær, og eisini er tað áhugavert, at Høvdavirkið turkar sína vøru við orku frá brennistøðini á Hagaleiti.

Jón Rasmussen vísir á, at ein slík verkætlan er arbeiðsskapandi við tað, at fleiri fólk í Leirvík kunnu turka og pakka hesa vøru, samstundis sum verkætlanin er arbeiðsskapandi umborð á Norðborg, har einir 30 mans eru í hesi framleiðslu.